VIÐMERKINGAR

# Hví skulu danskir myndugleikar ráða í Føroyum?

**Høgni Hoydal**



Ein norðmaður var á vitjan í Føroyum í summar, í ferðalagi við norðurlendingum úr Danmark, Noregi, Svøríki, Íslandi og Finnlandi.

Á einum fundi vildu fleiri í ferðalagnum hava grundgevingar fyri, hví føroyingar vildu vera ein fræls tjóð.

Norðmaðurin tók orðið og segði: Hesin spurningurin er skeivt settur. Spurningurin eigur at setast øvugt. Hví skulu danskir myndugleikar hava nakað ræði í Føroyum? Hví skulu føroyingar ikki hava allan avgerðarrætt í sínum egna landi og samstarva við hinar norðurlendsku tjóðirnar og heimsins lond á jøvnum føti?

Ongin kundi sjálvsagt grundgeva fyri hesum.

Men júst hesin spurningur eigur at setast til allar teir politikarar, sum eru valdir at umboða Føroya fólk, men sum vilja lata danskar myndugleikar ráða í Føroyum.

Føroya fólk er bert einaferð spurt um sína støðu — á fólkaatkvøðuni í 1946. Tá, søgdu vit: Vit eru ein tjóð, ið nú vil javnsetast við aðrar. Vit vilja hava fólkaræði at galda í Føroyum. Føroyingar skulu vera sjálvstøðug tjóð — tí vit vilja hava eitt betri og rættvísari samfelag og tí vit vilja samstarva við onnur lond á jøvnum føti.

Henda avgerð er enn ikki sett í verk.

**Níggju spurningar til sambandspolitikarar**

Tí eiga eitt nú Jóannes Eidesgaard og Lisbeth L. Petersen at kunna svara hesum spurningum nøktandi, um vit skulu taka teirra politikk í álvara:

1. Hví er tað ikki føroyska fólkið, sum hevur bygt hetta landið ígjøgnum meira enn 40 ættarlið, ið skal hava allan avgerðarrætt í Føroyum?
2. Hví skulu danska stjórnin, Fólkatingið og eitt embætisverk, sum ikki skilir okkara mál, hava nakran avgerðarrætt í Føroyum?
3. Hví vilja danskir myndugleikar ikki viðurkenna føroyingar sum tjóð — og hví stuðla javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin stjórnini í hesum máli?
4. Hví skulu danskir myndugleikar gera av, hvønn føroyingar kunnu samskifta við í altjóða viðurskiftum?
5. Hví skulu danskir myndugleikar gera av, hvørji pør skulu kunna skiljast, hvør skal hava foreldramyndugleika, og hvør skal ættleiða børn í Føroyum?
6. Hví skulu danskir myndugleikar gera av, hvør fær uppihaldsloyvi og arbeiðsloyvi í Føroyum?
7. Hví skulu danskir myndugleikar gera av, hvussu okkara rættarskipan skal vera, hvør skal vera dómari, hvør skal vera ákæri ella hvør skal vera løgreglumaður í Føroyum?
8. Hví skulu danskir myndugleikar gera av, hvør skal vera bispur og hvussu okkara kirkja og trúarlív kann skipast?
9. Hví skulu danskir myndugleikar hava nakað at siga um okkara undirgrund — og hví vilja teir ikki viðurkenna, at føroyingar eiga undirgrundina?

Svar ynskist.






## Vinnufundur í Sandoy

TÍÐINDASKRIV

Sandoyar Sýslu Vinnuráð skipar fyri vinnufundi í kantinuni á Sandoy Seafood í Skopun, **mikudagin hin 17. oktober kl. 20.00.**

Evni fyri fundin er kunningartøkni og møguleikar fyri at menna KT-hugskot í KT-klekingardeplinum, sum Vinnumálastýrið nýliga hevur sett á stovn.

KT-klekingardepilin veitir møguleikar fyri at menna góð hugskot til eina burðardygga KT- fyritøku. À fundinum verður greitt frá hvussu KT-klekingardepilin virkar, og annars eisini hvørjar møguleikar sum liggja í eini framtíðari føroyskari KT-vinnu. Menning av einum KT-virki verður víst sum dømi.

À fundinum verður framløga og tjak og luttøka verður av:

- Símun Hammer - stjóra á Virkisráðgeving og KT-samskipari
- ógvan Thomsen - stjóra á Fjarskiftiseftirlitinum
- Hjørdis Gaard - fulltrúa í Vinnumálastýrinum




Sosialurin




# Terji ger barnafløgu



*- Eg havi leingi hugsað um at givið fløgu við barnasangum út, og nú verður tað veruleiki, sigur Terji Rasmussen*

*Mynd: Jonhard Hammer*

**Terji Rasmussen stendur fyri barnafløgu, sum kemur út í november mánaði. Umfamt sangir og søgu, kann fløgan eisini brúkast í telduni**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Um vikuskiftið var tónleikurin til nýggja útgávu hjá Terja Rasmussen liðugt ljóðblandaður. Hesaferð er talan um eina barnafløgu, sum bjóðar spæl og annimatiónir til telduna, umframt sangir og søgu.

- Eg eri útbúgvin pedagogur og havi arbeitt nógv í barnagarði. Tá eg starvaðist á Norðasta Horni gjørdi eg sangir saman við børnunum, og tað eru millum annað hesir sangir, sum eru at finna á fløguni. Eg havi leingi hugsað um at givið teir út, og nú verður tað veruleiki, sigur Terji Rasmussen.

12 sangir eru á fløguni. Stóran part av hesum hevur Terji Rasmussen skrivað, men eisini James Olsen og Jógvan Telling eiga lut í tónleikinum. Tveir sangir, sum Hanne Boel og Sebastian hava gjørt, eru týddir til føroyskt. Ein søga er eisini á fløguni, og til hesa søguna hoyra fimm av sangunum.

### Eisini CD ROM

Umframt at brúka fløguna í vanliga fløguspælaranum, ber tað eisini til at brúka fløguna á telduni. Á fløguni liggja spøl og annimatiónir, og tað ber eisini til at syngja karokee.

Fløgan er upptikin í Sightseeing Production, sum er studio hjá Terja Rasmussen, og Flemming Hansson hevur ljóðblandað tónleikin.

Í løtuni verður seinasta hond løgd á CD ROM partin, men ætlanin er, at útgávan skal fáast til keyps eina ferð í komandi mánaði.

# Stjørnulið ger fløgu við Brandur Enni

**Kendir tónleikarar, komponistar og framleiðarar arbeiða við eini fløgu hjá Brandur Enni. Nógv verður gjørt burtur úr upptøkuni og framleiðsluni**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



*Fyrst í komandi ári kemur nýggj fløga við Brandur Enni, sum í hesum døgum verður tikin upp í Klaksvík, Havn og Keypmannahavn*

Fleiri upptøkuhøli í Føroyum og Danmark eru longu tikin í brúk til framleiðsluna av nýggjari fløgu við føroysku barna- og ungdómsstjørnuni Brandur Enni.

Nógvir kendir føroyskir tónleikarar, komponistar og framleiðarar eru við í arbeiðnum við fløguni.

Úr rúgvuni kunnu nevnast Niclas Johannesen, Kim Hansen, Jens Marni Hansen, Karl Martin Samuelsen, In-G, Óli Poulsen, Kári Jacobsen, Dagfinn Olsen og Steintór Rasmussen, sum samskipar arbeiðið við fløguni. Pegasus í Klaksvík hevur tikið stig til fløguna.

### Til Danmarkar

Brandur Enni syngur sjálvsagt allar sangirnar á útgávuni, men hann verður stuðlaður av góðum kórsangarum og tónleikarum.

Fleiri ymiskir føroyskir sangskrivarar, so sum Niclas Johannesen, Kári Jacobsen og aðrir, hava gjørt sangir til útgávuna, men onkur coverløg verða eisini á fløguni.

Í dag fer Brandur til Danmarkar, har upptøkur skulu gerast í studio í Keypmannahavn.

Fløgan kemur út fyrst í komandi ári.

# Gera føroyska árbók um tónleik



*Pop.fo og Sosialurin halda fram við sínum samstarvi, og nú verður føroysk tónleikaárbók gjørd*

**Síðst í november mánaði kemur á fyrstan sinni árbók út um føroyskan popp- og rocktónleik. Tað eru Pop.fo og Sosialurin, sum hava tikið stig til árbókina**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Nú fær føroyskur tónleikur sína fyrstu árbók.

Tað er Pop.fo, sum saman við Sosialinum stendur fyri útgávuni av bókini.

Pop.fo og Sosialurin syrgja í felag fyri at savna myndir, skriva greinar, gera yvirlit og umrøða hendingar frá tónleikaárinum, sum fór.

Bókin hevur deadline 1. november, og allar týðandi tónleikahendingar, sum er hendar til ta tíð, verða við í bókini.

Ætlanin er, at Tónleikur 2001 skal koma út síðst í november.

### Sig frá

Í nýggju árbókini, sum verður einar 100 síður til støddar verður ørgrynna av myndum - størra helvtin í litum - frá konsertum, útgávum og øðrum hendingum.

Umrøða verður av øllum týðandi hendingum innan føroyskan popp- og rocktónleik, so sum Prix Føroyum, konsertum av ymsum slagi, Ársins songrødd, útlendskum tónleikavitjanum í Føroyum og annað.

Um tú hevur okkurt hugskot, onkra viðmerking ella onkra spurning viðvíkjandi nýggju árbókini, ert tú vælkomin at venda tær til Sosialin ella Pegasus.

## Chase brúkar gamla Abba-maskinu

**Upptøkurnar av trummunum til nýggju fløguna hjá Chase verða gjørdar við gamlari Studer-bandmaskinu, sum Abba brúkti í síni tíð**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Ein partur av tónleikinum til nýggju fløguna hjá Chase verður upptikin á gamla tøkni, sum áður hevur tænt sera væl.

Hetta kann lesast á heimasíðuni hjá Chase.

Tað er ein gomul Studer-bandmaskina í Bandkraaft Studio í Keypmannahavn, sum skal syrgja fyri góðum trummuljóði á nýggju Chase-fløguni.

Hendan sama bandmaskina stóð í sjeytiárunum í Polar Studio í Stockholm, og júst hetta studio varð nógv brúkt av svenska poppbólkinum Abba.

Hóast allur hin tónleikurin á Chase-fløguni verður spældur inn á digitalar maskinur, so sigst gamla bandmaskinan syrgja fyri góðum og heitum trummuljóði, sum ikki kann fáast við digitalu tøknini.